# ERA MUNIN





*Barbara Andreasen fírir ikki fyri at taka eina hon í á rættini. Her klippur hon eina ær saman við Jóannes Jacobsen*



*Fyrra gongan er komin á rætt, og konur og avvarandi eru komin við einum drekkamunni til fjallmenninar*



*Ungur nemur, gamal fremur. Bárður Jensen og lítli Petur Holm klippa her saman einari ær*



*Seyðurin fær medisin, og lombini verða markað. Frá vinstru: Torlakkur Hansen, sum markar, Beinnir Poulsen, sum gevur medisin fyri orm, Tórolvur Poulsen og Rene Hansen, sum sproytar fyri brásótt*

monnunum, í dag renna menninir fyri hjá hundunum.

Væl vandir seyðahundar høvdu næstan sum einki klárað at rikið eina heila gongu einsamallir, og tað er bergtakandi at síggja og uppliva menn, sum við einføldum floytum stýra hundunum aftur og fram, upp og niður. Í dag eru tað ikki hundarnir, sum renna seyðin upp í varg, men heldur fjallfólkið.

- Hundarnir hava alt at siga. Eisini tá tú ert í haganum sum røktingarmaður. Áðrenn eg fekk hundarnar, var eg bara har. Eg fekk einki gjørt. Nú fái eg gjørt alt, sigur Rene Hansen, røktingarmaður, sum sjálvur hevur fimm hundar. Hann hevur tó sjáldan fleiri enn tveir við á fjall.

## Færri lomb

Torlakk Hansen hevur verið røktingarmaður í Heimaru Helvt í nógv ár. Hann sigur, at harði, strangi og langi veturin setti síni spor hjá seyðinum í vár, men at hann nú er komin nakað fyri seg.

- Nú er vøkstu komin í hagan, og seyðurin byrjar at koma fyri seg. Tó er tað ógvuliga misjavnt, hvussu lombini eru fyri. Fleiri eru stór og prú, meðan onnur er smá og ikki so væl fyri, sigur Torlakk Hansen.

Hann sigur, at lambatalið á Urðini var nøkurlunda, men í hinum báðum gongunum stóð verri til.

- Tá talt var saman vísti tað seg, at tað eru 30 lomb færri í mun til vanlig ár, sigur Torlakk Hansen.

Men sjálvt um raksturin gekk væl, so slapp nakað av seyði, so vónin er, at tá tað líður út á heystið og fjøllini verða gingin og tøkan kemur fyri, at tað so vísir seg ikki at vera heilt av leið kortini.

Dagurin hildnaðist kortini væl, og tá klokkan var farin av fýra, vóru seinastu seyðirnir sleptir úr rættini aftur.

leo@sosialurin.fo